## 28 snellubátar avreiddu í Sørvági í gjár

Í gjár tók Landingarmiðstøðin í Sørvági ímóti 11.000 pundum av útróðarfiski. Tað vóru 28 bátar, sum avreiddu, teir flestu úr Vágum, men eisini fleiri av Sandoynni. Mikudagin avreiddu 15 bátar til Landingarmiðstøðina, teir høvdu tilsamans um 7000 pund. Veðrið hevur verið gott hesa vikuna, streymurin er harður, men fer nú at batna. Í morgun fóru fleiri bátar aftur til útróðrar, hann lotar av suðri - 8m/sek., hann verður helst sunnan í ættini til mikudagin í komandi viku, men tað verður ikki nógvur vindur, vindferðin fer at liggja um 10 m/sek. allar dagarnar.

## Andstøðan bjóðar Heina formanssess

Samgongan fyrireikar uppskot um nýtt býti av nevndarsessum. Støðan hjá samgongutingmonnunum Gerhardi Lognberg og Heina O. Heinesen tykist í hesum sambandi óviss. Heini O. Heinesen veit í øllum førum ikki, um hann far nakran nevndarsess frá samgonguni. - Eg veit ikki, um eg fái nakað frá samgonguni. Eg eri limur í Tjóðveldi og ynski framhaldandi at vera tað. Men eg havi ikki fingið greið boð um býti av nevndarsessum, sigur Heini O. Heinesen við Portalin. Andstøðan hevur hinvegin bjóðað honum nevndarsess, um hann verður partur av valbólkinum hjá andstøðuni. - Eg kann fáa formanssessis í vinnunevndini, um eg vil. Men eg vil helst vera valdur í nevnd sum partur av Tjóðveldi og samgonguni, staðfestir tjóðveldistingmaðurin.

# Betri tilboð til kundan



*Nýggja leiðslan í Kringvarpi Føroya. Frá vinstru Hans Andor Johannesen, tekniskur leiðari, Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, Barbara Samuelsen, dokumentarleiðari, Sanna Hansen, starvsfólkaleiðari, Herluf Sørensen, programmleiðari, Jón Brian Hvidtfeldt, tíðindaleiðari og Allan Dalsgarð, miðlaleiðari*

**Nýggi kringvarpsstjórin, Annika Mittún Jacobsen, sigur við Rás2, at við bygnaðarbroytingunum roknar hon við, at teir tríggir miðlarnir hjá almenna kringvarpinum fara at kunna bjóða hyggjarum, hoyrarum og lesarum eina enn betri tænastu**

KRINGVARP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Nú seks nýggir deildarleiðarir eru settur í Kringvarpi Føroya er áhugavert at vita, hvat fer at henda í kringvarpinum. Kári Mikkelsen hevur tosað við Anniku Mittún Jacobsen og spurt, hvussu vit koma at merkja broytingarnar.

Fyrst skulu vit koma at kenna hvønn annan. Nýggju deildarleiðararnir fara í fyrsta umfari at tosa við sínar deildir og finna fram til, hvussu tey leggja arbeiðið til rættis frameftir. Fina út av, hvar er møguligt og hvat ber til, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Arbeiðið hjá henni hevur verið at fullført ætlaðu samanleggingina av útvarpi og sjónvarpi.

Síðani eg tók við havi eg arbeitt við at fullført samanleggingina av útvarpi og sjónvarpi. Tað nýggja er, at alt er lagt saman í eitt, tað vil siga eina deild fyri bæði útvarp og sjónvarp, tað verið seg tíðindadeild ella tekniska deild og so framvegis, sigur kringvarpsstjórin.

Tað nýggja er miðladeildin, sum er ein menningardeild, ið skal leggja strategiir og hugsa frameftir.

Kringvarpsnevndin hevur arbeitt við málinum saman við fyrrverandi stjóranum. Tað havi eg hugt eftir og mett um, hvat reint praktiskt ber til, eins og eg havi litið aftur á, hvussu farið hevur verið fram í teimum undanfarnju størvunum, eg havi verið í áður. Út frá tí gjørdi eg eitt upplegg, sum eg legði fyri leiðslu og starvsfólk, og sum tey so kjakaðust um og gjørdu viðmerkingar til, sigur Annika Mittún Jacobsen.

### Góð kapping

Men hóast útvarpið og sjónvarpið formelt eru løgd saman í ein stovn, so eru miðlarnir reint fysiskt skiltir at. Tað hevur ljóðað, at tíðindadeildin øll skuldi flyta oman í Vørðsluna.

Vit skulu jú øll enda her í Sortudýki, men hvussu tíðindadeildin verður skipað, er heilt upp til nýggja tíðindaleiðaran. Men tað hevði sjálvandi verið ynskiligt, at tíðindadeildin fysiskt situr saman, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Hon óttast ikki fyri, at samansjóðingin av tíðindadeildini fer at merkja minni kapping á økinum.

Eg haldi, at tað hevur verið góð kapping á tíðindaøkinum síðani nýggja kringvarpslógin kom í gildi. Og vit fara framvegis at hava tríggjar tíðindaeindir, útvarp, sjónvarp og internetið, sigur kringvarpsstjórin.

Fleiri politikarar løgdu dent á, at talan framvegis skuldi verða um tvær atskyldar tíðindadeildir, tá uppskotið um at leggja útvarpið og sjónvarpið skuldu leggja saman skuldi samtykkjast.

Mann hevur valt at seta ein stjóra fyri báðar miðlarnar, og talan verður um fleiri redaktiónir. So tað vænti eg ikki verður nakar trupulleiki, sigur Annika Mittún Jacobsen.

### Betri umstøður

Tað liggur í kortunum , at byggjast skal upp í verandi útvarpshús í Sortudýki, og kringvarpsstjórin vónar, at peningur verður settur av á fíggjarlógini í ár, so byrjast kann upp á arbeiðið.

Tað kann væntast, at tað ganga eini tvey til trý ár frá tí at arbeiðið byrjar, til bygningurin er klárur at flyta inn í. Men eg rokni við, at tann dagurin upprennur innan fyri tey fimm árini, sum eg eri settur sum kringvarpsstjóri, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Men eitt er at hava karmarnar í lagi, onkur skal eisini verða at fylla teir út.

Kringvarpsgjaldið stendur í stað, meðan lønirnar alsamt vaksa, so tað verður etið burtur av starvsfólkatalinum. Vit eru nú 20 færri starvsfólk í dag í mun til 2004, sigur Annika Mittún Jacobsen.

Men hon er kortini bjartskygd, tá talan er um framtíðina.

Vit fremja bygnaðarbroytingar, og eg rokni við, at vit fara at kunna bjóða hyggjarum, hoyrarum og lesarum eitt enn betri tilboð, sigur kringvarpsstjórin, Annika Mittún Jacobsen.



SKEIÐ til byrjarar
2. og 3. september ’08

Excel I
- tey fyrstu fetini

**Situr tú enn við roknimaskinuni** og hyggur eitt sindur øvundsjúk/ur eftir teimum, sum bara tasta alt inn á Excel og vupti, so er úrslitið klárt? Ella brúkar og hevur tú kanska brúkt Excel í minni mun, men kundi hugsa tær at lært forritið heilt frá grundini?

**Tað er nú tú hevur møguleikan** at læra og fáa stóra gleði av Excel. Kom á 2-daga skeið saman við tínum líkum og fá Excel-dreymin uppfyltan;-). Teknað teg skjótast, tí plássið er sera avmarkað!

**Um Excel**
Excel er eitt rokniark, har tað er møguligt at arbeiða við tølum og grafum uppá allar hugsandi (og óhugsandi) hættir. Við at luttaka á hesum skeiðnum, fært tú grundleggjandi kunnleika til Excel. Tú lærir tær mest brúktu og mest týðandi funkurnar. Aftaná skeiðið kanst tú brúka og fáa stóra gleði av forritinum í tínum dagliga arbeiði.

**Skeiðið vendir sær til tey**, sum hava hug til, ja kanska í longri tíð hava havt hug til, at læra tær grundleggjandi, týðandi og mest brúktu funkurnar í Excel.

**Tú hevur lítlar ella ongar** royndir við Excel frammanundan, men vit rokna við, at tú hevur arbeitt við teldu áður.

**Tilmelding og les meira** um skeiðið á heimasíðu okkara - www.synergi.fo. Tú ert eisini vælkomin at ringja.

**Vælkomin til tiltøk hjá Synergi**

Synergi

Synergi • Tvørgøta 1 • 100 Tórshavn • www.synergi.fo • synergi@synergi.fo
32BELL (322355) • 322FAX (322329) • skype: synergiasa